# Handilslærlingur til Skemmuna



**Gerst lærlingur og fá nógvar fyrimunir!**

- Møguleika fyri altjóða útbúgving
- Spennandi smásøluútbúgving við egnum skúla
- Møguleika fyri arbeiði í útlandinum við stórum avbjóðingum

**Vit vænta av tær:**
At tú ert samstarvsfús/ur, ert sjálvstøðug/ur, hevur nógva orku og áræði, er opin og ikki bangin fyri at siga tína meining.

**Tú verður skjótt til nakað um tú sjálv/ur vilt:**
Tað er einki óvanligt, at ein næmingur í Skemmuni verður tilnevndur deildarleiðari stutt eftir lærlingatíðina, takkað verið teimum avbjóðingun hann fær. Tað eru nógv sum verða verandi í Skemmuni tá tey eru liðug at læra, og møguleikarnir eru nógvir. Í 16 ár hevur Skemman saman við deildum sínum í øðrum londum skapt meiri enn 300 arbeiðspláss. Og tað legst afturat ár um ár. Skemman hevur nú deildir í hesum londum: Íslandi, Canada, Letlandi og Litavia.

**Skúlagongd:**
Skúlagongdin fer fram í Danmørk.
Sjálvt skúlauppihaldið undir lærlingaútbúgvingini fer fram á "Jysk" skúla í Norður-Jútlandi. Útbúgvingin fer fram á stats viðurkendan hátt (øll almenn krøv verða fylgd), har tú,afturat teimum kravdu lærugreinunum, eisini fær nógv størri fakliga kunnan enn gjøgnum vanliga handilsútbúgving.
Gjøgnum skúla-uppihaldið býrt og etur tú á skúlanum saman við hinum lærlingunum. Hetta gevur eitt einastandandi samanhald til langt eftir lærlingatíðina.

**Krøv:**
At gerast lærlingur í Skemmuni krevst FHS ella onnur miðnámsútbúgving.

**Nær skalt tú byrja?**
Lærlingaplássini skulu setast so skjótt sum møguligt.

**Ljóðar hetta spennandi?**
Send so eina skrivliga umsókn skjótast gjørligt til

team 85

SKEMMAN
Staravegur 7 100 Tórshavn Tel 315588
skemman@skemman.fo

---

TÓRSHAVNAR KOMMUNA



## Pedagogar og/ella hjálparfólk

Tórshavnar kommuna søkir við hesum eftir pedagogum/ hjálparfólkum til frítíðarskúlan í Eysturskúlanum.

**Størvini:**
Talan er um tvey pedagogstørv/hjálparfólkastørv, 28 t.og 25 t. um vikuna og eitt avloysarastarv 20 tímar um vikuna í 4 mánaðir, frá 05. august til 29. november 2002, fyri hjálparfólk í farloyvi. Eisini verður søkt eftir reingerðarfólki 10 tímar um vikuna.

**Stovnslýsing:**
Á frítíðarskúlanum á Eysturskúlanum, ganga 42 børn og í Stoffalág eru 15 børn.

**Tað er týdningarmikið:**
- at tit hava hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag við virðing, áliti og umsorgan fyri tí einstaka barninum,
- at hava eitt gott samstarv millum foreldur og starvsfólk,
- dentur verður lagdur á, at umsøkjarin kann arbeiða sjálvstøðugt,
- er røkin og førur fyri at taka avgerðir í arbeiðinum.

**Vit leggja stóran dent á:**
- at vit eru eitt frítíðartilboð til børnini,
- at vit eru saman við børnunum í teirra frítíð,
- at skapa menningarmøguleikar fyri børnini, við at lurta, práta og vera saman við teimum.

**Setanarviðurskifti:**
Størvini verða sett tann 05. august 2002, við løn sambært sáttmála ímillum Kommunala arbeiðsgevarafelag og Føroya pedagogfelag. Um pedagogar ikki søkja, verða hjálparfólk sett í tíðaravmarkað starv.

**Meira fæst at vita um størvini:**
við at venda sær til Barbaru Dahl, leiðara tlf. 319370, um kvøldið, ella Katrina Petersen, samskipara tlf. 315160

**Umsókn:**
saman við viðmælum, upplýsing um útbúgving og royndum skulu vera frítíðarskúlanum í hendi seinast 3. august.

**Umsókninar skulu sendast til:**
Barbaru Dahl, leiðara, Tjarnarlág 24, 100 Tórshavn. Setanarsamrøður verða skjótast gjørtligt eftir hetta.

SNARSKIVAN

---

# Til allar pensjónistar í landinum

Tann 3. august verður Eldradagur hildin í Ítróttarhøllini í Vestmanna.

Byrjað verður kl. 9.00 til kl. 10.00 við morgunkaffi. Og endað eftir kaffi kl. 16.00.

Skráin er fjølbroytt. Kostnaður kr. 200,- pr. luttakara. Gjalding við inngongdina. Lutaseðlar verða seldir.

Allir pensjónistar eru hjartaliga vælkomnir at luttaka.

Tilmelding skjótast á tlf. 424133 - 424011 - 444191 - 441396 ella 444122.

---

# Hús í Runavík til sølu

Um nóg høgt boð fæst. Standa í friðarligum umhvørvi.

**Tlf. 449070**

---

# Summarfrí

Vit hava stongt vegna summarfrí frá 22.7.02. Byrja aftur mánadagin 12.8.02.

**Tannlæknastovan í Brekkugøtu**

---



# Skrivstovunæmingur

**til Kommunuskrivstovuna í Vági**

Á kommunuskrivstovuni er eitt læruplass í skrivstovuyrkinum - fyrisiting - leyst at søkja til setan 9. september 2002.

Umsøkjarar mugu hava staðið FHS-, HH-, Studentsella HF-prógv.

Lærutíðin verður fastløgd alt eftir, hvat prógv næmingurin hevur frammanundan.

Løn verður veitt eftir sáttmála millum kommunala arbeiðsgevarafelagið og fíggjarmálaráðið.

Umsókn við prógvum og møguligum viðmælum verður at senda til Vágs Kommunu, FO-900 Vágur, innan 12. august 2002. Viðmerk skrivstovunæmingur.

**Vágs kommuna**

---



# Handilslærlingur

Søkt verður eftir lærlingi til handil okkara at byrja skjótast tilber, tó kunnu vit bíða eftir tær, um tú verður liðugur í handilsskúlanum nú.
Arbeiðið umfatar alt vanligt handilsarbeiði so sum kundaavgreiðslu, útkoyring og bilegging av vørum og goymsluhald v.m.

Tað er eitt krav, at tú hevur koyrikort og HH ella FHS. Lærutíðin er 2 ár við HH og 3 ár við FHS. Partur av lærutíðini gongur fyri seg í skúla í Danmark.

Vit vænta at tú ert fryntlig/ur, hevur góð samstarvsevnir, dugir væl at umgangast fólk og ikki er bangin fyri at arbeiða sjálvstøðugt og taka eina ábyrgd.

Um tú ert tann rætti, kunnu vit bjóða tær spennandi lærutíð við nógvum spennandi avbjóðingum, sum tú kann hava stóra gleði av seinni í lívinum.

Eru spurningar hesum viðvíkjandi kunnu tit ringja til okkum á tlf. 311071.

Umsóknir við viðmælum verða at senda til okkum í seinasta lagi 22.07.02.

demich
**Stiðjagøta 2 - Postboks 378**
FO-110 Tórshavn
Telefon +298 31 10 71
Telefax +298 31 04 60
e-mail: demich@demich.fo

---

# Til sølu

Peugeot Boxer til sølu.

**Tlf. 212456/375656**

---

**Mentamálaráðið**

# Løgfrøðingur/Fulltrúi

***Starvið:***
Eitt áhugavert og fjølbroytt starv sum fulltrúi er leyst at søkja í aðalskrivstovuni.

Høvuðsuppgávurnar hjá fulltrúanum eru m.a.:

- Lógarfyrireikandi arbeiði, kunngerðir og reglugerðir innan málsøkið
- Løgfrøðilig ráðgeving og vegleiðing til starvsfólk, stovnar og borgarar
- Vegleiðing og kunning um nýggjar lógir o.a.
- Umsiting av málsøkjum, sum verða løgd til tín
- Málsviðgerð
- Kæruviðgerð
- Aðrar uppgávur

***Førleikakrøv***
Ynskiligt er, at tann, ið settur verður, hevur løgfrøðiligt embætisprógv.

Tað er ein fyrimunur, at tú hevur royndir úr øðrum starvi. Harumframt skalt tú bæði kunna arbeiða sjálvstøðugt og samstarva í arbeiðsbólkum o.ø.

***Vit bjóða:***
- Starvið er spennandi við skiftandi uppgávum og við nógvum samskifti úteftir
- Samstarv við royndar løgfrøðingar
- Sjálvstøðugt starv
- Skeið og eftirútbúgvingarmøguleikar

Arbeiðið er á einum høgum fakligum stigi, og møguleikarnir fyri bæði persónligari og fakligari menning eru góðir.

Tú kemur at arbeiða í einum spennandi umhvørvi við skiftandi uppgávum tætt saman við politisku myndugleikunum og stovnum innan undirvísing, gransking og mentan.

***Setanar- og lønartreytir***
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið.

Viðmerkjast skal, at setanarøkið fevnir um ráðini, Løgmansskrivstovuna og deildir tess.

***Umsókn***
Umsókn við prógvum o.ø skulu sendast til:

Mentamálaráðið
Hoyvíksvegur 72
Postrúm 3279
110 Tórshavn

Umsóknin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi 19. august 2002. Starvið verður at seta skjótast tilber.

Um tú ynskir fleiri upplýsingar, kanst tú ringja til Petur Petersen, aðalstjóra í Mentamálaráðnum, á tlf. 35 50 50.

*__Mentamálaráðið__ hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
*Í __aðalskrivstovuni__ eru stápsfunktiónir innan m.a. løgfrøði, búskap, kunningartøkni og fyrisiting. Fyriskipanin er býtt í 3 deildir - fólkaskúladeild, vinnu-/miðnámsskúladeild og mentamáladeild - sum stápsfunktiónirnar veita ráðgeving til, umframt til aðalstjóran og landsstýrismannin.*

---




---

# Summarfrí

Vegna summarfrí verður kommunuskrivstovan stongd frá 22. juli til og við 9. august 2002.

**Gøtu Kommuna**

---

# Summarfrí

Vegna summarfrí er skrivstovan stongd frá 22. juli til 12. august.
Átrokandi boð verða avgreidd á 225410.
Vit ynskja viðskiftafólki okkara eitt gott summar.

**P/F ALMA Maskinverkstaður & Smiðja**